NVD *Rit*

SERRITGERÐ
Thesis

TØKNIFRÁGREIÐING
Technical Report

UNDIRVÍSINGARTILFAR
Teaching Material

UPPRIT
Notes

# Túrfrágreiðing

## Úrslit frá yvirlitstrolingini á Føroyabanka

## 4.- 10. mai 1995

*Cruise report: Results from the groundfish trawl survey on Faroe Bank*

*May 4th- 10th 1995*

Eyðfinn Magnussen



NVD*Rit* 1995:1

NÁTTÚRUVÍSINDADEILDIN Faculty of Science and Technology
FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA University of the Faroe Islands

Heiti / Title **Úrslit frá yvirlitstrolingini á Føroyabanka**
**4. - 10 mai 1995**
*Results from the groundfish trawl survey on Faroe Bank*
*May 4th – 10th 1995*

Høvundur / Author **Eyðfinn Magnussen**

Ritslag / Report Type Tøknifrágreiðing/*Technical Report*

NVD*Rit* 1995:1
© Náttúruvísindadeildin og høvundurin

Útgevari / Publisher Náttúruvísindadeildin, Fróðskaparsetur Føroya
Bústaður / Address Nóatún 3, FO 100 Tórshavn, Føroyar (Faroe Islands)
Postrúm / P.O. box 2109, FO 165 Argir, Føroyar (Faroe Islands)
☎ • 🖷 • @ +298 352550 • +298 352551 • nvd@setur.fo

Fólk frá FRS:
Arnold Henriksen, Regin Kristiansen, Eyðfinn Magnussen og Marner Simonsen (fuglateljing)

Ábyrgd:
Eyðfinn Magnussen

Endamál:
Høvuðsendamálið við túrinum var at fáa eitt mát fyri nøgdini og biologiina hjá teimum týdningarmestu fiskasløgunum, id finnast á Bankanum. At náa hesum máli, vóru tiknar trol- og CTD-støðir. Umframt hettar, vóru tiknir prøvar til neringssølt, æti og magar til at kanna hvat fiskurin át. Marner Simonsen var eisini við á túrinum og taldi fugl.

Reiðskapur:
Vanligt yvirlitstrol varð nýtt, t.e. 116 fót kassatrol við Steinhamn og vanligum grunni. Í nøkrum tovum varð hædd og vídd á trolinum mátað. Tógtíð var 1 tíma. At samla djóraæti var ein wp2 glúpur nýttur.

Um túrin:
Fóru av Havnini á midnátt við kós móti Føroyabanka. Komu á Bankan um middagstíð næsta dag. Kastaðu fyrstu ferð kl.11.37. Prøvatakingin gekk sum ætlað. Tó vóru 3 trolstøðir broyttar:

XVIII-13 ----> XVII - 1 (Snellubátar lógu á økinum)
XVIII-60 ----> XVIII-53 (Korallbotnur. Tá hetta er ein av teimum føstu støðunum, átti hon møguliga at verið flutt)
XVIII-39 ----> XVII-40 (Hendan støðin varð flutt longur inn á Bankan fyri at fáa tosk.Støðin varð tikin um náttina.)

Tal av prøvum:

| Prøvar | | Tal av prøvum |
|---|---|---|
| Trolstøðir | | 30 |
| Magar | | 424 |
| PCB | Tosk | 10 |
| | Hýsu | 10 |
| | Upsi | 10 |
| CTD-støðir | | 20 |
| | Djóraæti | 20 |
| | Plantuæti | 20 |
| | Føðslusøltir | 109 |
| | Klorofyl a | 42 (14 støðir) |

Viðgerð:
Hvørt hál varð gjørt upp. Øll fiskasløg av vinnuligum áhuga komu fram á vektina og prøvar tiknir. Allur toskurin, og tað mesta av hýsuni og upsanum, varð nitrað. Mátiútgerðin á trolinum riggaði bert í nøkrum hálum. Serliga var tað sensorurin, id skuldi mátað víddina á trolinum id, sveik.

Úrslit:
Úrslitini frá túrinum eru enn ikki gjørd upp. Tað tyktist tó, sum tað var meira av smáfiski í trolinum hesaferð enn undanfarin ár. À sunnara enda av bankanum fingu vit í einum háli einar 6-8 faðurserkar og 2 búrfiskabrøður. Í næsta hálinum var eisini onkur faðurserkur í trolinum. Eingin hvítingur varð fingin á Bankanum.

Tað var lítið av fugli at síggja á túrinum.

10. mai 1995

Eyðfinn Magnussen